# Beinta vann íslandsferðina

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið lot av ymsum ættum og møguliga regn. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og møguliga turt og sólglottar, men um kvøldið veksur hann vindin og regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men týsdagin veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn ella ælingur. Hitin millum 3 og 7 stig.

**Beinta Andreasen úr Havn vann ein ferðaseðil til íslands í kappingin »Kennir tú Bíbliuna«, sum Sosialurin skipaði fyri til jólar. Beinta fer til Íslands í summar saman við flokki sínum**

VINNINGUR
*Edvard Joensen*



Tá sjeyndi flokkur í Adventistaskúlanum í Havn fer til Íslands í summar, fer ein av næmingunum at ferðast við ferðaseðli, hon hevur vunnið fyri at vita væl um bíbliusøgu.

Tað er Beinta Andreasen, sum vann kappingina um bíbliusøgu, sum Sosialurin skipaði fyri upp undir jól. Kappingin nevndist »Kennir tú Bíbliuna?«

Flokkurin hjá Beintu fer til Íslands við Atlantsflog tann 16. juni og kemur heimaftur tann 23 juni, sigur Sonja Danielsen, sum er lærari á Adventistaskúlanum og fer við flokkinum til Íslands. Børn og foreldur rinda sjálv fyri ferðina, tó at eitt sindur av stuðuli er fingin frá FITUR.

Men Beinta sleppur undan at rinda fyri ferðaseðilin, sum hon hevur vunnið og nú fingið handaðan saman við einum páskareggi frá Sosialinum.

Tey fara at búgva á einum gomlum kostskúla, sum eitur Hlíðardalsskóli og liggur við Thorlakshøfn á Suðurlandinum, greiðir Sonja Danielsen frá. Haðani fara tey at ferðast íkring og vitja kend støð á Suðurlandinum. Vitjað verður millum annað í Hveragerði og sjálvandi verður eisini farið til Gullfoss, Geysir og Tingvallir.

Túrurin endar við tveimum døgum í Reykjavík, sigur Sonja Danielsen. Og allir dagarnir enda við einum túri í svimjihyli, sum nógvir eru av í Íslandi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷10 |
| Nuuk | ÷1 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷5 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 8 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 10 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 11 |
| Kiev | 10 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 7 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 17 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 16 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | – |
| New York | 14 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 31 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1013 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og dýpist. Eitt hátrýst, 1043 hPa. vestan fyri Írland stendur mestsum í stað og viknar.




Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Vestur-Noreg verður yvir Føroyum komandi samdøgur.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/03 kl. 06⁰⁰– 25/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,6°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 5,1 mm – mált frá 24/03 kl. 06⁰⁰–25/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 80,4 mm


Spf.
HESTPRENT
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo



I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT
WWW.JAVNI.FO
JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

20. mars: Tendring
27. mars: Mánin longst frá jørðini
29. mars: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. mar | 10.26 | 22.49 | 09.26 | 21.49 | 09.41 | 22.04 | 00.04 | 12.26 | 01.04 | 13.26 | 08.41 | 21.04 | 07.41 | 20.04 | 10.41 | 23.04 | 11.41 | — | 10.11 | 22.34 | 11.26 | 23.49 |
| 29. mar | 01.51 | 14.28 | 00.51 | 13.28 | 01.06 | 13.43 | 03.51 | 16.28 | 04.51 | 17.28 | 00.06 | 12.43 | 11.43 | — | 02.06 | 14.43 | 03.06 | 15.43 | 01.36 | 14.13 | 02.51 | 15.28 |
| 27. mar | 11.12 | 23.37 | 10.12 | 22.37 | 10.27 | 22.52 | 00.49 | 13.12 | 01.49 | 14.12 | 09.27 | 21.52 | 08.27 | 20.52 | 11.27 | 23.52 | 00.04 | 12.27 | 10.57 | 23.22 | — | 12.12 |
| 28. mar | — | 13.12 | — | 12.12 | — | 12.27 | 01.37 | 15.12 | 02.37 | 16.12 | 11.27 | — | 10.27 | 23.06 | — | 13.27 | 00.52 | 14.27 | — | 12.57 | 00.37 | 14.12 |

5 707265 100050 >